UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Dagfesting: **31. oktober 2019**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-29**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 11/2019 frá Brandi Sandoy, løgtingsmanni, eftir Tingskipanini § 52a. Fyrispurningur um avleiðingar fyri føroyskar bøndur av ætlaðu broytingunum í handilssáttmálanum millum Føroyar og ES, settur landsstýrismanninum í uttanríkismálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52a).

Fyrispurningurin er soljóðandi:
Hvussu ætlar landsstýrið at endurgjalda bóndum fyri fíggjarliga tapið teir fara at hava av ætlaðu broytingunum í handilsavtaluni millum Føroyar og ES?

Svar

Føroyar og ES eru komin ásamt um at seta eina tollfría kvotu á seyðakjøt úr ES til Føroya á 40 tons. Kvotan hækkar til í 80 tons eftir trý ár. Frammanundan samráðingunum hevði ES kravt størri tollfría atgongd til føroyska marknaðin fyri bæði seyðakjøt og mjólkarvørur. Kvotan er úrslit av samráðingunum í felagsnevndini fyri handilssáttmálan millum Føroyar og ES, ið helt fund í Føroyum tann 9. oktober í ár.

Á sama fundinum var semja um tollfrælsi fyri frystan og virkaðan brisling umframt at avtaka ásetingina í frumskjali 4 til sáttmálan um, at einki gluten skal vera í teimum 20.000 tonsunum av fiskafóðri, sum Føroyar kunnu útflyta tollfrítt til ES. Henda avmarking hevur í roynd og veru virkað sum ein beinleiðis forðing fyri útflutningi av fiskafóðri til ES-marknaðin. Mett verður, at henda atgongd hevur stórt virði fyri føroyska fiskafóðurframleiðslu.

Tað er landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, sum umsitur landbúnaðin sum málsøki. Tað er tó ivasamt, um nakað fíggjarligt tap er fyri bóndir í Føroyum, at tollur á 10% verður tikin av innflutningi av seyðakjøti úr ES. Lagt kann verða aftrat, at longu í dag verða innfluttar stórar nøgdir av útlendskum seyðakjøti tollfrítt til føroyska marknaðin, og innflutningurin úr ES er ein sera avmarkaður partur av hesum.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður